# Menningarstovan væl nøgd við árið í fjør



- Virksemið hjá Menningarstovuni í 2004 var í fyrsta lagi merkt av, at stovnurin er vorðin styrktur sum tað Útflutningsráð Føroya, hann í veruleikanum er, sigur Kjartan Kristiansen, stjóri

**- Útflutningsdeildin hjá okkum hevði sum málsetning at fáa 40 fyrispurningar frá føroyskum fyritøkum um útflutningsviðurskifti, men tá ið avtornaði, táttaði talið á fyrispurningum upp ímóti 70. Hetta svarar til, at meira enn ein fyrispurningur er komin frá fyritøkum, sum flyta út vørur og tænastur, sigur Kjartan Kristiansen, stjóri**

VINNUVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Menningarstovan hevur skrivað eina ársfrágreiðing um virksemið hjá stovninum í farna ári og Kjartan Kristiansen, stjóri, sigur, at tey sum heild eru rættiliga væl nøgd við avrikini í 2004.

- Í teimum broytingartíðum, sum vinnuliga og samfelagsliga standa fyri okkum, eydnaðist tað Menningarstovuni at skapa fjølbroytt tilboð til føroyska vinnu at ganga nýggjar menningarleiðir, sigur hann.

Kjartan vísir á, at virksemið hjá Menningarstovuni í 2004 í fyrsta lagi var merkt av, at stovnurin er vorðin styrktur sum tað Útflutningsráð Føroya, sum hann í veruleikanum er.

- Útflutningsdeildin hevur í virknum samstarvi við vinnu og samstarvsstovnar heima og uttanlands bygt upp eitt gott vitanargrundarlag. Deildin er nú før fyri at svara flestu spurningum, sum føroyskar fyritøkur hava um útflutning.

Hann sigur, at Menningarstovan hevur atgongd til fleiri dátugrunnar og marknaðarkanningar, eitt nú Kompass, Euro-Monitor, upplýsingar frá danska útflutningsráðnum, útflutningshondbøkur hjá norðurlendsku útflutningsráðunum og annað.

- Útflutningsdeildin hevði sum málsetning at fáa 40 fyrispurningar frá føroyskum fyritøkum um útflutningsviðurskifti, men tá ið avtornaði, táttaði talið á fyrispurningum upp ímóti 70. Hetta svarar til, at meira enn ein fyrispurningur er komin frá fyritøkum, sum flyta út vørur og tænastur.

Kjartan vísir á, at fyri at styrkja hesa tænastu varð í 2004 alnetsútgávan av eini føroyskari útflutningshondbók gjørd liðug. Hondbókin er ein almenn vegleiðing í marknaðarføring og útflutningi, bæði strategiskt og praktiskt.

- Í 2004 byrjaðu vit at senda út tíðindabrævið, Rit um Rák, til allar fyritøkur, sum eru skrásettar í okkara Export Directory á heimasíðuni, www.trade.fo. Tíðindabrævið verður sent út til 150 fyritøkur. Vit hava heft okkum við, at áhugi er fyri hesum tíðindum, sum er kunningar um virksemið hjá okkum, um tænastur, sum vit kunnu bjóða, ætlaðar handilsferðir, áhugaverdar framsýningar, tiltøk og annað, sigur stjórin, Kjartan Kristiansen.

## At eggja til størri samvinnu úteftir

**- Nýggj roynd varð gjørd at fáa í lag størri samvinnu millum russiskar fiskivinnufyritøkur og føroyskt tænastuvirksemi. Vit valdu at vera við á Fish 2004 í Moskva við tí endamáli eisini at fáa í lag samvinnu millum føroyskar fiskaútflytarar og russiskar fiskakeyparar. Kanska settu fólk í so stórar vónir til hesa handilsferð, men samumtikið var tiltakið rættiliga væl eydnað, sigur Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni**

VINNUVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum liður í útflutningsarbeiðnum, tók Menningarstovan í fjør lut í og var við í samskipanini av føroysku luttøkuni á European Seafood Exposition 2004 í Brússel og ONS 2004 í Stavanger.

- Báðar framsýningarnar eru afturvendandi tiltøk, har luttakandi fyritøkurnar kunnu bjóða seg fram og vera sjónligar. Tiltøkini eru fram úr góð høvi at útbyggja og styrkja sambond við keyparar og veitarar, sigur Kjartan Kristiansen, stjóri.

Hann vísir á, at framsýningin í Brússel er størsta sjómataframsýningin í heiminum, har fyritøkur um allan heim kappast um at sýna fram nýggjar vørur og framleiðslur og annars fáa íblástur og nýggj samstørv.

- ONS gevur eins og Offshore Europe føroyskum fyritøkum høvi at royna at koma upp í part í oljuvinnuni, sum vónandi verður ein skjótt komandi vinna í Føroyum.

Í frágreiðingini nemur Kjartan eisini við umrøddu framsýningina, sum var í Moskva.

- Nýggj roynd varð gjørd at fáa í lag størri samvinnu millum russiskar fiskivinnufyritøkur og føroyskt tænastuvirksemi. Vit valdu at vera við á Fish 2004 í Moskva við tí endamáli eisini at fáa í lag samvinnu millum føroyskar fiskaútflytarar og russiskar fiskakeyparar.

Kjartan heldur, at kanska settu fólk í so stórar vónir til hesa handilsferð, men samumtikið var tiltakið rættiliga væl eydnað.

- Eftir ferðina hava fleiri av luttakandi fyritøkunum hitst fyri at umrøða og samskipa møguligt nýtt átak, helst á Murmansk-leiðini, har fleiri av stóru reiðaríunum halda til – ella møguliga í Kaliningrad.

Stjórin vísir á, at annar táttur í arbeiðnum hjá Útflutningsdeildini er at eggja vinnum og fyritøkum at gera handils- og kunningarferðir til áhugaverdar marknaðir.

- Í 2004 varð eitt nú skipað fyri handilsferð til London og luttøku á ráðstevnuni, Value Added Seafood. Henda ferð varð fyriskipað í fjør heyst saman við sendistovu okkara í Bretlandi, og høvi var til fleiri virkisvitjanir og fyrilestrar, sigur Kjartan Kristiansen.

Sosialurin fer at venda aftur til aðrar partar av ársfrágreiðingini hjá Menningarstovuni í øðrum bløðum.



*Ein partur av samvinnuni millum føroyingar og russar er, at russar nú keypa smáan føroyskan upsa, sum annars er ringur at sleppa av við fyri líkinda prís*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*